

# Útseld Eivør konsert í Flensborg

Fyrrakvøldið spældi Eivør Pálsdóttir eina sera væleydnaða konsert í einum útseldum Flensborghúsi, í samband við norðurlendskt/týskari ráðstevnu í Flensborg.

Yvir fimm hundrað fólk høvdu tryggjað sær atgongd til konsertina, ið var tað mentanarliga klimaksið á eini norðurlendskt/týskari ráðstevnu um Norðurlond og Evropa. Her var sostatt útselt longu, áðrenn konsertin fór í gongd.

Føroyavinurin Arne List, sigur at tað vóru óvanliga nógvir týskarar í konsertini, tí Flensborghúsið er miðdepil fyri danska minnilutan í økinum. Annars vóru eisini rættiliga fitt av danum, onkur føroyingur og onkur íslendingur eitt nú heimskendi rithøvundurin Einar Már Guðmundsson.

Arne sigur konsertina vera eina av teimum bestu, ið hann hevur upplivað við Eivør, ið var stórsligin, avslappað og tyktist at kenna seg á heimavølli. Eivør spældi í tveimum settum og endaði við ikki færri enn trimum eykaløgum: Summertime, Nú brennur tú í mær og Må solen alltid skinna.

# n kann fáa hjálp næsta ár

og slætt um tey skulu verða noydd at flyta av landinum fyri at fáa eitt nóg gott tilboð til sonin.

### Skulu hava nøktandi tilboð

Hans Pauli Strøm skilir væl, at foreldur at børnum við serligum tørvi, eru illa fyri og hart kroyst og hann heldur eisini, at tað er sjálvsagt, at føroyska samfelagið hevur nøktandi tilboð til børn við serligum tørvi av hesum slagnum.

Endar tað við, at foreldur at hesum børnum føla seg kroyst at flyta av landinum, hevur hann ikki orð fyri tí.

– Politiskt kann slík viðferð av borgarunum ikki góðtakast. Men politiskt viðurkenna vit eisini ábyrgdina og hava tikið avgerð um at loysa trupulleikan.

Hans Pauli Strøm sigur, at hann tískil vónar, at arbeiðið, sum nú er sett ígongd, fer at enda við einum nøktandi tilboði til hesi børnini.

Samstundis er ætlanin at skipa fyribils tilboð til tey børn, sum hetta ítøkiliga snýr seg um, til tann endaliga loysnin er funnin, men akkurát, hvussu hetta tilboðið verður, veit hann ikki.

### Hjálpin hvarv

Fyrr var støðan tann, at Skúlin á Trøðni hevði ein dagstovn til børn við serligum tørvi í barnagarðsaldri.

Har vórðu børnini ansað, samstundis sum tey fingu viðgerð av ymsum slagi, eitt nú fysioterapi, ergoterapi og aðra viðgerð, sum kravdust fyri at menna børnini.

Men so gjørdi Mentamálaráðið av at stongja hendan dagstovnin, tí sernámsfrøðiliga økið skuldi umskipast.

Sostatt varð dagstovnurin stongdur í vár og samstundis datt hetta tilboðið til børn við serligum tørvi eisini niðurfyri.

– Tann stóri trupulleikin var, at dagstovnurin á skúlanum á Trøðni varð niðurlagdur uttan at eitt annað tilboð varð sett ístaðin.

Hans Pauli Strøm heldur ikki, at hetta var nóg gott og hann sigur, at Almannaráðið og Heilsumálaráðið mælti frá, at dagstovnurin varð niðurlagdur við so stuttari ávaring, at tað var ógjørligt at hava eitt annað tilboð klárt at lofta teimum børnum, sum høvdu brúk fyri tí.

– Tað er eyðsæð, at tað hevur elvt til stórar trupulleikar, at tilboðið á skúlanum á Trøðni varð tikið av, uttan at nakað annað varð klárt at seta ístaðin.

Landsstýrismaðurin sigur, at tað tekur sína tíð at byggja eitt slíkt tilboð upp til børn við serligum tørvi, tí talan er júst um eitt heilt serligt tilboð, sum umfatar fleiri ymsar fakbólkar og umfatar bæði stuðul og viðgerð.

– Vit skulu sostatt bæði hava fakfólkið at taka sær av hesum og vit skulu eisini hava serlig høli til endamálið.

### Arbeiðið sett ígongd

Hans Pauli Strøm sigur fyri at finna loysn, hevur málið verið umrøtt á felags fundi ímillum Mentamálaráðið og Almanna-og heilsumálaráðið.

Á tí fundinum varð staðfest, at hendan støðan kundi ikki halda fram.

Úrslitið av fundinum var, at ein nevnd við umboðum fyri Mentamálaráðið og Almannamálaráðið skal setast at snikka eitt skæddaraseymað tilboð saman til børn við serligum tørvi í barnagarðsaldri.

Hendan nevndin skal so gera eitt tilmæli um, hvussu eitt slíkt tilboð skal skipast, sum bæði umfatar ansing og stuðul og hann vónar, at tað fer at bera til at seta tilboðið í verk næsta ár.

– Tá vóni eg at vit fáa skipað viðurskifti á økinum, so at hesi børn og foreldur teirra sleppa úr gráa økinum ímillum Mentamálaráðið og Almanna- og heilsumálaráði, men so at vit vita akkurát, hvør hevur ábyrgdina.

### Illustratión

Í Sosialinum um vikuskiftið kærdu tvey foreldur sína neyð um, hvussu illa tað gekk at fáa hjálp til lítla sonin, sum hevur heilaskaða og sostatt tørv á serligari umsorgan. Tey harmast um, at dagstovnurin á skúlanum á Trøðni varð niðurlagdur, uttan at annað, hóskandi tilboð kom ístaðin. Í Føroyum eru tilboðini til slík børn so vánalig, at foreldrini spyrja rætt og slætt um tey skulu verða noydd at flyta av landinum fyri at fáa neyðugu hjálpina



Smábørn við serligum tørvi:

**Hava ongan góðan**

Stuðulsskipanin er ein góð skipan, men hon kann ikki setast í staðin fyri øll tey fakfólkini, ið starvast á Skúlanum á Trøðni. Og tá tað snýr seg um børnini og menning teirra, kunnu vit ikki góðtaka tað næstabesta, siga Eydna Skaale og Ragnar við Streym, foreldur at barni við serligum tørvi



# ki fáa nóg góða hjálp

deildina á skúlanum á Trøðni og tað skuldi í øllum førum verið nøktandi beinagrund at bygt víðari á, tí har eru bæði høli og fakfólk, sum eru von við hetta økið.

– Tí er tað heilt óneyðugt at leggja málið í ein arbeiðsbólk og eg dugi ikki at skilja, hví hetta skal taka so langa tíð.

– Hetta er heldur ikki eitt mál, sum hevur tikið seg upp beint nú. Men í hesum føri vóru vit- enn einaferðvitni til, at tilboð og trygd hjá einum veikum bólki í samfelagnum verða tikin burtur, uttan at hugsað verður nóg væl um avleiðingarnar og uttan at nakað annað er klárt at seta ístaðin.

Eitt annað dømi um hetta er, at tænastumannastørvini á stovnum skulu takast at, hóast tey eru einasta trygd ímóti, at verkfall er á stovnunum og at tey, sum har búgva, koma at liggja hjálparleys.

Eitt triðja dømi er, at stuðulsfólkaskipanin varð broytt, uttan at Almannastovan fekk neyðugu tíðina at gera neyðugar tillagingar og tað fekk ógvuliga óhepnar avleiðingar.

– Hetta er heilt ótrúliga óheppin framferðarháttur. Vit hava onki ímóti broytingum, men tað er ikki nóg gott, tá ið vit ferð eftir ferð síggja, at summi detta niðurímillum, tí broytingarnar eru ikki nóg væl fyrireikaðar.

Annlis Bjarkhamar sigur, at Javni fer nú at biða um fund við Hans Paula Strøm fyri at vita, hvar málið liggur og um, hvør skal hava ábyrgdina av tí.

Á hesum fundinum ætlar Javni at vita, hvussu landið liggur, nú smábarnadeildin á Sernámsdeplinum er niðurløgd.

– Vit vilja fegin hava eina greiðari mynd á hvørji tilboð eru til smábørn við serligum tørvi og hvussu vit fáa eitt greiðari ábyrgdarbýtið millum Almanna- og heilsumálaráðið og Mentamálaráðið á hesum øki.

– Vit halda, at landsstýrið skyldar foreldrunum hjá hesum børnum at geva teimum gerið boð um, hvat er í væntu og nær, tey kunnu vænta nakað, sigur Annlis Bjarkhamar.



*– Hetta ber ikki til. Málið er einfalt og eg dugi ikki at síggja, hvør trupulleikin skal vera. Tað einasta, sum krevst, er, at Hans Pauli Strøm og Jógvan á Lakjuni semjast um, hvør av teimum báðum skal hava ábyrgdina, tí alt tað praktiska má vera at finna útav rættiliga skjótt, sigur Annlis Bjarkhamar, dagligur leiðari á Javna*